# Stranda Máling keypt Beckers Máling

**- Vit fara framhaldandi at selja Beckersmáling, sum er eitt kent dygdarmerki, men sum frá líður verður samlaða útboðið størri við tað, at handilin eisini fer at selja Stranda Máling. Hetta verður tó ikki sama úrval av Stranda Máling, sum Balslev selir fyri okkum, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk**

EIGARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Stranda Máling á Strondum hevur keypt Spf. Litbúðina í Niels Finsensgøtu í Havn, sum er kend fyri at selja Beckers Máling.

Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum saman við Eivindi Jacobsen eigur Stranda Máling, sigur, at handilin framhandandi fer at selja Beckers Máling, sum er eitt kent dygdarmerki, ið hevur nógvar "stam-kundar", sum hann tekur til.

- Útboðið av Beckers Máling verður eins stórt og higartil, men sum frá líður fara vit at veksa um útboðið av máling við tað, at vit eisini fara at selja Stranda Máling.

Hann vísir á, at Balslev seinastu árini hevur verið og framhaldandi fer at verða teirra umboð í høvuðsstaðnum - við øllum teimum vørum, sum Stranda Máling hevur.

- Sum frá líður verða okkara vørur eisini at fáa í Beckers Máling, men hetta verða ikki somu vørur, sum Balslev selir.

Jógvan Óli leggur dent á, at góða samstarvið, sum Stranda Máling hevur við Balslev, fer at halda fram óbroytt.

- Balslev fer framhaldandi at verða okkara "fulla" umboð í høvuðsstaðnum, sum hann tekur til.

Standa Máling hevur keypt Beckers Máling frá dananum, Joen Eriksen, sum hevur verið leingi í Føroyum og skilir føroyskt.

- Joen fer framhaldandi at reka handilin í Niels Finsensgøtu, men nú verður tað so við okkum sum eigarum, sigur Jógvan Óli.

### Størri hølir

Hann vísir á, at Stranda Máling sum frálíður ætlar at útvega sær eini størri høli í Havn, tí hølini, sum felagið við keypinum nú leigar í Niels Finsensgøtu, eru ov trong.

- Vit hava smáar 100 fermetrar at ráða yvir, men hetta verður heldur lítið, nú vit fara at veksa um útboðið.

Jógvan Óli á Fríðriksmørk heldur, at Stranda Máling fær brúk fyri hølum, sum eru umleið 200 fermetrar til støddar.

- Við keypinum av Litbúðini og Beckers Máling vilja vit styrkja um okkara støðu á marknaðinum.

Hann sigur, at Stranda Máling hevur gjørt onkra roynd upp ígjøgnum árini við sølubúð.

- Men eg vil siga, at hetta er okkara fyrsta veruliga royndin í so máta, sigur Jógvan Óli á Fríðriksmørk.




*Eivind Jacobsen og Jógvan Óli á Fríðriksmørk, sum eiga Stranda Máling, hava nú keypt Litbúðina og Beckers Máling í Havn. Joen Eriksen, sum seinastu árini hevur átt fyritøkuna, heldur fram sum dagligur leiðari*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Strandferðslan vil hava greið boð frá landsstýrinum

**Strandferðslan vil nú hava greitt at vita frá Landsstýrinum um ferðafólk skulu hava rætt til at fara á hotel at eta og at sova, tá ið ólag er á siglingini. Og hon vil eisini hava at vita, hvør skal betala**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skulu ferðafólk, sum skulu við skipum hjá Strandferðsluni, hava rætt til at fara á hotel at eta og at sova, tá ið ólag er á siglingini.

– Tað er ein spurningur, sum Strandferðslan nú vil hava greitt svar til uppá frá landsstýrinum.

Og er hetta ein rættur, sum ferðafólk skulu hava, vil Strandferðslan eisini hava at vita frá landsstýrinum, hvør skal betala fyri hesa nýggju tænastu.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta eru spurningar sum krevja greitt svar frá landsstýrinum og tí fer hann nú at senda innlendismálaráðnum ein skrivligan fyrispurning um hesi viðurskifti.



*– Ferðafólkið hjá Strandferðsluni hevur sjálvsábyrgd, tí vit kunnu hugsa okkum skilið, um so var, at vit høvdu skyldu til at geva ferðafólki mat og innivist, tá ið ólag var á siglingini ella koyringini, sigur Kristian Davidsen, stjóri*

### Endaðu á Sjómansheiminum

Tað er eftir eina hending eitt hóskvøld herfyri, at hesin spurningurin hevur tikið seg upp.

Smyril hevði mist róðrið og mátti í dokk á Skála.

Hann skuldi sigla av Havnini til Suðuroyar klokkan sjey á kvøldið, men av tí at hann var í dokk, fekk hann ikki siglt fyrrenn klokkan fýra um náttina.

Í hesum sambandi vendu ferðafólk sær til Strandferðsluna, tí tey meinti, at Strandferðslan hevði skyldu til at útvega teimum annan flutning til Suðuroyar ella at útvega teimum innivist.

Men Strandferðslan vísti aftur at veita hesum fólkum serligar sømdir.

Tað fekk ferðafólk at venda sær til Løgmann, sum aftur vendi sær til Landsstýrismannin í innlendismálum, sum umsitur Strandferðsluna og hann gav Strandferðsluni boð um, at ferðafólkið kundi fara á Sjómansheimið at vera. Endin var, at summi av teimum eisini fingu kamar á Sjómansheiminum.

Spurningurin er, so, hvør skal betala hesa rokningina. Eitt av ferðafólkunum, sum var á Sjómansheiminum, Hans Olaf Andersen í Lopra, sigur, at hann betalir onga rokning, so skal hann fyrr í rættin við Strandferðsluni.

### Strandferðslan ongar skyldur

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, staðfestir, at Strandferðslan hevur ongar skyldur mótvegis ferðafólki, tá ið ólag er á siglingini ella á koyringini hjá Bygdaleiðum

– Tað stendur á síðu 45 í ferðaætlanini, at Strandferðslan hevur ikki skyldu til at skipa fyri øðrum flutningi, ella hevur endurgjaldsskyldu, tá ið bussar ella ferjur eru fullsett, ikki koyra ella sigla orsaka av veðri, seinkingum, væntandi samskifti, verkfalli o.s.fr.

Kristian Davidsen sigur, at sostatt eru reglarnar púra greiðar og hetta er eisini tann siðvenja, sum Strandferðslan hevur arbeitt eftir.

Stjórin á Strandferðsluni nevnir at um veturin kemur tað javnan fyri, at siglingin verður avlýst restina av degnum.

– Í tí sambandi hevur Strandferðslan ongantíð goldið fyri innivist ella mat til ferðafólk.

Hann sigur, at tað hevur sína orsøk, at reglarnar eru so greiðar og at Strandferðslan frásigur sær alla ábyrgd.

– Tað er umráðandi at hava í huga, at ferðafólkið keypa ikki ferðaseðil, fyrrenn tey eru komin umborð. Tí kann hetta ikki samaberast við eina flogferð, har ferðaseðilin verður bílagdur frammanundan.

– Vit kunnu so hugsa okkum, hvussu skilið hevði verið, um so var, at vit høvdu skyldu til at geva ferðafólki mat og innivist, tá ið ólag var á siglingini ella koyringini.

Hann heldur, at tað verður ómetaliga torført at gera sær eina meting av, hvørjar avleiðingar ein slík skipan kundi fingið fyri Strandferðsluna.

Hann sipar til, at so kundi hundraðtals fólk troppa upp úti á Strandferðsluni og kravt døgverða og innivist á hotelli.

– Hetta er orsøkin til, at ferðafólkið hevur eitt slag av sjálvsábyrgd og at Strandferðslan ikki átekur sær at veita ferðafólki endurgjald, hóast tað sjálvsagt er ógvuliga óheppið fyri tey, leggur hann afturat.

### Vilja hava greið boð

Kristian Davidsen sigur, at í hesum serliga føri, tá ið Smyril misti róðrið, varð tann avtala gjørd, at tey kundu fara á Sjómansheimið at fáa ein drekkamunn og sita heitt innandura.

– Men vit hava ongantíð góðtikið at gjalda fyri gisting og tað undrar okkum, at tey skulu hava fingið tilsøgn um gisting fyri okkara rokning.

Stjórin á Strandferðsluni sigur hann vil nú hava greiði á um Landsstýrið ætlar, at Strandferðslan skal broyta siðvenju á hesum øki.

Og hann fer nú at skriva til landsstýrið fyri at vita, hvussu galdandi reglar skulu vera á hesum øki.

– Seta vit eina slíka skipan í verk fyri Strandferðsluna, verður tað sjálvandi eisini ein fíggjarligur spurningur og vit mugu eisini fáa at vita frá Landsstýrinum, hvussu tað skal fíggjast, sigur Kristian Davidsen.